# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Eg eri langt, langt niðri. Og eg skilji framvegis ikki, tað sum er hent*

*Michael Rasmussen*

# Høvuðsstaðurin fær nýtt 10-mannafar

**Sámal Hansen skal smíða bátin til Knørrafelagið, ið hevur funnið manning til bátin, sum teir ætla skal eita Ormurin Langi**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Í ár hevur Eysturoyingur verið púra suverenur. Hann hevur onga kapping fingið frá bátum í høvuðsstaðnum. Í hvussu so er trý 10-mannafør hava tað mesta av sumrinum staðið í neystum í høvuðsstaðnum – Havnarbáturin, sum onkra ferðina hevur verið at sæð, Hoyvíkingur og Nólsoyingur.

Men tað er væl hugsandi, at í hvussu so er ein bátur í høvuðsstaðnum næsta ár fer at geva óføru kapprógvarunum á Skálafjørðinum kapping.

Róðrarfelagið Knørrur hevur avrátt við Sámal Hansen, bátasmið, at hann skal smíða felagnum eitt 10-mannafar. Sámal fer í holtur við bátin nakað eftir Ólavsøku, og ætlanin er, at báturin skal verða liðugur eina ferð í vetur.

Sjúrður Gullbein, formaður í Róðrarfelagnum Knørri sigur, at tað eru eldsálir í felagnum og nevndini, sum hava ábyrgd av ætlanini, og at tað er heilt víst, at nýggja 10-mannafarið fer at verða mannað næsta ár:

- Í fjør høvdu vit framúr manning umborð á 8-mannafarinum Knørri. Tað er longu greitt, at fleiri av hesum monnunum fara at verða bulurin í nýggju manningini á 10-mannafarinum. Vit hava samband við aðrar góðar menn eisini, og tað er um tað lagið, at báturin longu er mannaður, sigur formaðurin í Knørrafelagnum.

## Hoyvíkingur og Ormurin Langi

Á fínu heimasíðuni hjá Róðrarfelagnum Knørri, rk.fo, verður greitt frá, hvussu ætlanin um nýggja 10-mannafarið kom í lag. Har verður sagt, at tey í Knørrafelagnum tosaðu við hoyvíkingar um at fáa Hoyvíking at umboða felagið:

Síðsta summar vóru samráðingarnar lidnar, og hoyvíkingar vildu lata okkum bátin ókeypis við teirri treyt, at hann æt Hoyvíkingur, men skuldi annars vera ogn okkara og bera øll eyðkenni hjá Róðrarfelagnum Knørri, verður sagt á heimasíðuni, sum heldur fram:

Fólk vóru tó ikki á einum máli um, hvørt hetta var rætta leiðin at ganga. Summi hildu tað vera skilagott at fáa Hoyvíkina aftur at sær, tí hon er fólkarík og kann geva felagnum nógvar rógvarar í framtíðini - onnur hildu hinvegin, at Róðrarfelagið Knørrur fór at missa sín samleika og gjørdist eitt hoyvíksfelag heldur enn eitt felag fyri øll. Afturvendandi spurningurin var, hvørt Róðrarfelagið Knørrur ognaði sær Hoyvíking, ella um hoyvíkingar ognaðu sær eitt siðvant róðrarfelag.

Hetta var ein rættiliga prinsipiellur spurningur, sum viðvíkti hjartanum í felagnum, og 26. august varð kallað til eykaaðalfundar um málið. Til henda fundin kom inn uppskot frá Peturi í Gong og Magnusi Gaard um heldur at keypa nýtt tíggjumannafar, sum skuldi eita Ormurin Langi. Tá ið atkvøtt varð, var stórur meiriluti fyri hesum uppskoti, og málið um Hoyvíking fall. Soleiðis endaði málið, og uppskotssetararnir arbeiða nú við at útvega felagnum nýggja farið.

Soleiðis verður sagt á rk.fo, og nú er ætlanin vorðin so mikið ítøkilig, at kjølurin til Ormin Langa verður strektur seinni í summar ella tíðliga í heyst.

## Stórur vøkstur

Róðrarfelagið Knørrur hevur verið í ógvusligum vøkstri seinastu árini. 8-mannafarið Knørrur og 6-mannafarið Jarnbardur hava leingi verið einastu bátarnir hjá felagnum. Nú eru tvey 5-mannafør komin afturat. Í fjør var tað Jallurin, og í ár er tað Tambar.

- Vit høvdu 23 rógvarar í fleiri ár. Nú eru vit 55, so tað kann ikki sigast annað, enn at talan hevur verið um stóran vøkstur, sigur Sjúrður Gullbein, formaður í Róðrarfelagnum Knørri.

Higartil hevur tað serliga verið á kvinnusíðuni, at Knørrur hevur gjørt um seg. Við 10-mannafarinum vóna teir, at mannligi profilurin fer at verða styrktur.

Í felagnum eru fleiri eldsálir. Tað hevur verið arbeitt við at fáa til vega nýtt neyst.

- Tíverri mugu vit bara staðfesta, at í tí er einki nýtt at frætta í løtuni, sigur Sjúrður Gullbein, sum fegnast um eldsálirnar, sum eru við til at skapa lív og trivna í felagnum, hóast karmarnir ikki eru, sum tey vilja og vóna, at teir eina ferð fara at verða.




*Knørrur hevur higar til verið størsta farið hjá kappróðrarfelagnum, Knørrur, men nú er so ætlanin, at felagið skal hava nýtt 10-mannafar*

*savnsmynd*

## Jannie á veg móti 50

**Róðursmaðurin og bátsformaðurin á Jarnbardi hava vunnið fleiri gullkrónur enn nakar annar rógvari nakrantíð**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*

Tað er møguleiki fyri fleiri metum í Knørrafelagnum um ella kanska rættari sagt, tá ið Jarnbardur við kvinnumanning fer at vinna á Ólavsøku.

Jarnbardur við kvinnumanning hevur longu fyrr í summar tryggjað sær 10. FM heiti.

Um Jarbardur vinnur í morgin, so verður tað 50. ferðin, at stýrimaðurin Jannie Dam Jacobsen fer at vinna ein FM kappróður. Henni á baki er bátsformaðurin Eivy Olsen. Hon hevur í morgin møguleika at fáa gull um hálsin fyri 48. ferð.

Talan er um einastandandi avrik, sum eingin annar rógvari nakrantíð hevur verið í nánd av.

Jannie, 26 ár, og Eivy, 29 ár, róðu fyrstu ferð við Jarnbardi í 1996. Tað árið vunnu tær ongan róður. Tá var Hvessingur bestur, og Jarnbardur var nummar tvey í øllum róðrunum. Árið eftir tryggjaðu tær sær FM á Ólavsøku. Jannie hevur stýrt Jarnbardi øll árini síðani. Eivy var ikki við í 1998, tá ið báturin vann tveir róðrar.

*Eru sigrarnir framvegis søtir?*

- Summir sigrar hava sjálvandi verið minnisríkari enn aðrir. Eitt nú ólavsøkusigurin í 1997, tá ið vit tryggjaðu okkum FM. Eitt tað størsta vónbrotið var í 1998, tá ið vit taptu á Ólavsøku og harvið ikki vunnu FM, sigur Jannie Dam Jacobsen.

*Umhugsa tit at gevast?*

- Eg havi altíð sagt, at tá ið tað ikki verður spennandi og stuttligt at rógva, so fari eg at gevast. Eg haldi tað framvegis vera hugaligt og stuttligt at rógva saman við góðum bátsfeløgum.